VALGREINAR

Eitt týdningarmikið val!

Sigmund Andreasen
valevni Miðfloksins í Suðuroy

Tá orðið valg verður nýtt, kann eg ikki lata vera við at nevna, at vit øll uttan aldursmark hava tann møguleika at gerða tað størsta og besta valið nakrantíð, " veljið Harran sum Nr 1.

Vit mennisku hava fingið rætt at lívga um skapanarverkið, og hava vit her í Føroyum valg sum snýr seg um at stjórna Føroyum tey næstu 4 árini. Sjálvur eri eg stillaður upp fyri Miðflokkin í Suduroy, tad sum hevur mín áhuga, og er arbeiði mítt, er fiskur og tað, sum hevur við fisk at gera. Sjálvur havi eg ikki troytt so nógv Føroyagrunnar, men sum so nógvir aðrir Føroyingar roynt aðrar møguleikar, og tá má tað verða við fremmandum skipum, tí tann føroyski líniflotin er ov bundin av at fiska runt oyggjarnar.

Tað er og hevur verið nokk til av fiski hesi seinastu árini, serliga dýrum fiski sum toskur, men vit skulu ikki siggja burtur frá, at sjálvt um vit hava 200 fjóðringa fiskimark, so er tað ikki eitt stongt mark, tað letur seg væl gerða at svimja inn um markið, men eins væl út um markið. Leitar mann aftur í tíðina til fyrsta túrin hjá mær í 1964, tá kundu vit vera stoltir av okkara nýmótans líniflota, vit hava nú 2004, hvussu sær út í dag? Jú, tey somu línuskipini sigla enn, meðan trolaraflotin roynir at fylgja mótanum. Í áttatíárunum varð upphøggingarstuðul latin, so vit kundu fáa nøkur nýggj línuskip í flotan, tað komu eisini nøkur stásilig skip, men okkara stýrandi polittikkarar syrgdu fyri at avreiða tey til okkara grannatjóðir við millióna tapi fyri hvørt skipið.

Her siggja vit eina mynd av tveimum Írskum fristilínuskipum, AVRO CHIEFTAIN og AVRO VIKING. Teir eru heilt innilokaðir við brunni í miðjuni, sum ger tað trygt og lætt at fiska í øllum veðri og serliga á djúpum vatni har nógv fiskasløg finnast, sum vit í Føroyum ikki royna eftir. Vit eiga at hava eyguni opin fyri øllum fiskimøguleikum.

Sjálvur gjørdi eg eina roynd at fáa Føroyingar til Grønlands vid línu, her er talan um fyrst á nýggjárinum tá toskurin bleiv vekk, eg fekk eina avtalu vid Grønland, eg kundi fiska frítt við Føroyskum skipi og manning, gjørdi eina avtalu við landsins mynduleikar sum áttu Líniskipið "Bláfossur", sum hevði fingið upphøggingarstuðul og lá á Tvøroyri, teir skuldu gera mær skipið klárt til hesa veiðu, men rokningin skuldi ikki yvirstrika 1,4 mió. Tað bleiv byrjað at gera klárt, men tá avtalan var við at ganga í lag bleiv steðga, vegna at motorurin skuldi skiftast út, so teir vóru leysur av avtaluni. Men tað skal sigast, at Blafossur siglur við sama motori í dag, og hevur gjørt tað sera gott í Grønlandi. Sum dani varð eg biðin um at fáa onnur skip til Grønland og bað eg teir seta seg í samband við teir, ið stýrdu her heima, men onki hoyrdis víðari.

Eg veit at Grønland setti seg í samband við Noreg, og teir lótu ikki boðini fara aftur við borðinum, teir hava fiskað fyri 100 tals milliónir í Grønlandi, og fiska enn í dag. Í heyst var eg ein túr í Eysturgrønlandi við norskum línuskipi, og má eg siga at eg ongantíð havið sæð so nógva lodnu í sjónum, sum sigur mær, at spurningurin er bara um tíð, til toskurin aftur er í Grønlandi.

Eg vóni við hesum fáu orðum at onkur pera ferð at lýsa hjá teimum, ið skulu stjórna landinum eftir valið.

Við hesum vil eg ynskja øllum í Føroyum eitt gott og eydnuberandi nýggjár við einum góðum Miðflokkavali.

Nýggj útflutningsvøra?

Terji Rasmussen
valevni sjálvstýrisflokksins í Suðurstreymoy

Eg haldi at tíðin er komin til at tosa um, at seta á stovn eitt alment tónlistarligt útgávufelag, við professionellari leiðslu á handilsligum grundarlag, har eisini tann privati váðafúsi kapitalurin, bæði úti og heima, tekur lut. Endamálið hjá felagnum skal vera at marknaðarføra føroyskan tónleik úti í stóru verð.

Hetta kann gerast við at landið setur ávísa upphædd av um árið í 6 til 8 ár í ein grunn, har eisini privat luttaka við áleið somu upphædd.

Felagið skal tó fara í gongd við sítt virksemi beinanvegin, og tann fyrsta uppgávan kundi til dømis verið at fólk fór út um landoddaranar at snodda til hvussu onnur hava fingið úrslit á hesum økinum.

Tað eru fólk sum vilja vera við, at hetta er ein alt ov dýr íløga, tí trupult er at koma inn á altjóða marknaðin. Men royndir aðrastaðni vísa júst tað øvugta. Íløgurnar nýtast nevniliga ikki altíð at vera so stórar, meðan úrtøkan ofta vísur seg at vera ørandi stór, um ætlanin eydnast. Tá hugsa verður um hvussu stórar íløgur skulu gerast fyri at fáa t.d. fisk út á marknaðin, er hetta ein lítil dropi í havið í mun til hvussu stór úrtøkan kann gerast. Tað er eingin trolari sum kann fáa líka stóra ársúrtøku úr sínum tilfeingi, sum ein fløga, sum slær ígjøgnum á heimsmarknaðinum.

Partur av yvirskotinum kann oyramerkjast til tann meira eksperimenterandi tónleikin og aðrar listagreinar. Á tann hátt verður tað listin sum figgjar seg sjálva. Tá kann sleppast undan tosinum um at mentan bert er ein útreiðsla. Vinnuframagrunnurin og framtaksgrunnurin høvdu sjálvandi verið ein náttúrligur partur í hesi ætlan.

Tá gongd er komin á felagið er einki til hindurs fyri at privatisera, soleiðis sum eisini ætlanin er við bankunum, Føroya Tele, Atlantsflog og øðrum.

Hesin sami leisturin kann sjálvandi eisini brúkast til marknaðarføring av føroyskum bókum.

Ert tú við uppá hetta? - So eri eg tín maður!

Hvør kann? D kann!

Nær kemur næsta komplottið frá Føroya Bólkinum?

Egin Henriksen
valevni Miðfloksins

Tá tað bleiv kunnugt í Føroyum, at í Danmark sótu bólkar frá figgjarheiminum og statsvaldinum og planløgdu, hvussu Føroyar skuldu rennast um koll, vóru fólk bæði skelkað og óð.

Naiv og fitt, sum vit Føroyingar vórðu, fingu vit eina ordans útpurring.

At "Moder Danmark" kundi verða so ónd og gemen við síni "fattige børn ud i Færø" var bara so ótrúligt.

Vit vóru jú uppfløska við, at danir dugdu best og vildu tað besta fyri okkum, so best var ikki at hugsa ov nógv, men lata danir ráða.

Hans mejestæt Rikkard Mikkelsen den første og hansara riddarar.

Tá so lavinan fór á rull, og statsvaldið ikki megnaði at halda øllum lortinum undir teppinum, valdu teir, kanska fyri at lætta trýstinum, at likvidera kongin, teir sjálvir høvdu útnevnt "Hans mejestæt Rikkard Mikkelsen den første".

Nú spyrt tú, góði lesari kanska, hvat eg vil við hesum. Hetta er jú farin tíð, vit mugu líta frameftir!

Jú, men tað kann kosta dýrt ikki at læra av fortíðini.

Hvat er vorið av øllum "riddarunum, ið kongurin útnevndi". Eru teir eisini allir falnir í ónáði, ella sita nakrir teirra enn og hála í tragrir?

Mær tykir, at meginpartin av Føroya fólkið og harvið av politiska systeminum, so væl og virðuliga er inntórnað aftur eftir at verða vakt av einum óndum dreymi.

Halda tit veruliga at danska systemið liggur og svevur bara tí, at ein Rasmussen er avloystur av einum øðrum Rasmussen, so kunnu tit bara lesa í bløðunum, hvør í t.d. skrivaði nýársroðuna hjá Fogh.

Nei, vissuliga har er einki broytt.

Bankin
Av tí at oksarnir í landinum høvdu etið seg um rygg og ikki vóru gonguførir, blivu Palliba og Marsanna spent fyri vognin at draga landinum, tað sokallaðu "Banka bjargingina" í land - bjarging fyri hvønn? kundi man freistast at spurt.

Drátturin var so harður og tungur, at fleiri av børnum Palliba og Marsannu fullu frá á vegnum og eru ikki aftur á vegnum og eru ikki aftur á vegnum og eru ikki afturí aftur komin enn. Men teimum hevur eingin lagt í at spyrja eftir enn minni at bjarga.

Einaferð í tíðini varð ein annar Føroya Banki, sum den Danske Bank átti. Hann var settur effektivt og elegant uppá pláss, minnist meg rætt, av einum samlaðum løgtingi við einari lóg um, at edv-skráir við upplýsingum um Føroya fólk, ikki skuldu liggja og sløgast uttanfyri landoddarnar. Henda lóg má so ella so hava rakt meint hjá onkrum "interessum", tí tað hevur verið roynt at gera álop á hana líka síðan, at Føroyar komu upp undan aftur figgjarliga.

Snorksvevur føroyska pressan?
Eg undrist stórliga á herferðina frá peningastovnunum, við millum annað heilsíðu lýsingum í bløðunum móti Føroya Landstýri, og sum nú er enda sum stevning - er hetta ikki óhoyrt ?

Tað mest marghátliga er kanska, at "skuldareyvin Okkara Banki", bjargað við sveitta og tárum frá føroya fólki, gongur á odda í herferðini móti sínum egna eigara.

Eg spyrji bara hvør ræður á Føroya landi?

Tað, sum her gongur fyri seg, er egentliga tað, at alt tað føroyska figgjarkervið ætlar sær til Danmarkar við øllum sínum edv-kervi.

Tað ljóðar so flott at Elektron,ið er eitt Føroyskt felag, stevnir landinum.

Men Elektron, sum onnur partafeløg, hevur eina nevnd, so tað er faktist nevndin ella meirilutin av nevndini í stevnir.

Hví er ágangurin so ógvusligur?

Hvør og hvat liggur aftanfyri?

Hvat verða avleiðingarnar fyri samfelag okkara?

Eru hetta ikki spurningar ein vakin pressa átti at spurt?

Í øllum førum er skattaskipan okkara nær knýtt at peningastovnsskipanini, skal hon eisini enda í Danmark ?

Miðflokkurin
Kemur miðflokkurin til valdið eftir valið, so fara vit um neyðugt at lóggeva einaferð afturat, at forða bankunum at flyta tey heimligu viðurskiftini hjá føroyinginum út av landinum.

Fíggjarviðurskiftini hjá tí einstaka eru í dag so tætt bundin at peningastovnunum, at samfelagið kann ikki lata ein hvønn tilvildarligan bankastjóra dusa sær, sum hann vil.

Vit fara at gera alt, vit eru før fyri, at verja føroyingin og at menna føroyska vitan.

Tú fært eitt betri samfelag við Miðflokkinum til róðurs.

Gud signi Føroyar mítt land

X við lista H

VALGREINAR

Fyri umhvørvið og búskapin: Eina brennistøð – ikki tvær

Kári Mortensen
valevni Javnaðarfloksinsí Suðurstreymi

Kreppa er í IRF, tí skuldin er stór og raksturin tungur.

Verður tað betri, tá ið IRF um stutta tíð skal brúka 30 milliónir til nýtt dioxinfiltur og skjótt noyðist at keypa nýggjan ovn fyri aðrar 10-tals milliónir, tí verðandi ovnur er uppslitin?

Um somu tíð skal líknandi íløga gerast á brennistøðini hjá KOB.

Ovnarnir hjá báðum brennistøðunum klára at brenna 2,5 tons/tíma ella tilsamans 5 tons/tíma. Hetta er júst nóg mikið til alt ruskið í Føroyum í dag.

Tíðin er farin frá smáum ovnum - serliga tí at teir dálka lutfalsliga meiri enn større ovnar, men eisini tí at lættari er at gagnnýta orkuna frá brenningini í stórum ovnum.

Ein ovnur, sum brennur 6 tons/tíma kann dríva eitt "kraft/varma" verk, sum framleiðir streym (til SEV, sum so kann spara ein áarløk ella tveir) umframt at geva hita til eini 1500 sethús.

Hesin størri ovnurin kostar lítið meiri at keypa enn ein lítil ovnur.

Ein stórur ovnur er nógv bíligari (bæði at keypa og reka) enn tveir smáir, dálkar minni og gevur meiri orku til streym og hita.

Hvat skulu vit (IRF, KOB og vit øll) velja?

Vit hava onki val - serliga tí at so nógvir pengar eru at spara, bæði í íløgum nú og í rakstri framvyr.

Ein stórur ovnur skal nøkta tørvin hjá øllum landinum og alt arbeiðið hjá IRF og KOB skal samskipast út frá hesum.

Um kommunurnar í Føroyum í felag ikki megna at loysa hesa uppgávuna mugu landsmyndugleikarnir hjálpa til.

Eisini tí at Agenda 21 sáttmálin er galdandi í Føroyum og Kyotosáttmálin skjótt verður galdandi.

Spardi peningurin kann koma væl við til annað neyðugt umhvørvisarbeiði hjá kommunum og virkjum.

Vel burðardyggan umhvørvispolitikk - vel Javnaðarflokkin.

Hví er neyðugt við einum sterkum Fólkaflokki á tingi??

Ingi Olsen
valevni Fólkafloksins í Norðstreymoy

Bert við Fólkaflokkinum verður skatturin lækkaður enn meiri.

Jú, svarini eru heldur sjálvsøgd, men tey tola væl at verða endurtikin. Áðrenn seinasta val, legði Fólkaflokkurin doyðin á, at hann vildi arbeiða fyri, at beinleiðis skatturin bleiv settur niður. Í mong ár hava vit havt ein skattastiga, sum nærum ongantíð er "prístalsviðgjørdur", við tí úrsliti, at skatturin bara hækkaði. Hesum hevur Fólkaflokkurin arbeitt fyri at fáa broytt. Tað skal sigast, at tað hevur verið sera tung tøk at tikið, av tí at Fólkaflokkurin hevur staðið so einsamallur í hesum spurningi. Men tað seinasta úrslitið hjá fráfarandi samgongu sýggja vit nú árið júst er byrja. Skatturin er lækkaður.

Fyri okkum fólkaflokksfólk er hetta sera trupult at skilja, hetta at vit eru so einsamøll um at halda, at skatturin skal enn longur niður.

Vit hava leingi sagt, at vit hava heimsins hægsta skattatrýst. Nú kenni eg av góðum grundum ikki til allar heimsins skattaskipanir, men um vit taka tey londini vit vanliga samanbera okkum við, so hevur ein kanning júst staðfest tað, sum Fólkaflokkurin leingi hevur vitað. At skatturin í Føroyum er væl hægri enn londini vit fegin vilja samanberast við. Fólkaflokkurin hevur eisini fleiri ferðir sagt, at skattafrádrátturin til sjómenn ikki verður skerdur, so leingi Fólkaflokkurin hevur ábyrgd. Aftur her stendur flokkur A sera einsamallur. Hinir flokkarnir vilja hesum frádráttinum til lívs - ongantíð ov skjótt. Fólkaflokkurin hevur sagt, at skal hann burtur, so verður tað við at allur skattur verður settur niður og ikki við at nakar skal hava meira í skatti. Tað er tó óhugsandi, at skatturin kann lækkast "eftir einum degi". Men hetta eigur so avgjørt at verða málið - hetta at allur skattur skal enn longur niður.

- Og tí er tað so týdningarmikið, at Fólkaflokkurin kemur sterkur inn á ting.

Valið 2004…… eitt sermerkt val

Kjartan Joensen
valevni Fólkafloksins í Eysturoy

Longu aftur stendur val fyri durum og tann 20. januar verður løgtingið mannað av nýggjum. Tað er tú sum veljari, ið avgerð, hvussu mannað verður og tann 21. januar byrjar so tann politiski dagligdagurin aftur. Tað er ikki eiti á politiskum lyftum, møguleikum, dreymakendum verkætlanum og framtíðar ynskjum og vánum vit hoyra um hesar dagar upp undir valgið. Sum veljari eiga vit at duga at velja burturúr og síggja veruleikan, sum hann er. Ikki alt letur seg gera her og nú og sumt letur seg als ikki gera, soleiðis sum vit kenna verðina og møguleikarnar í dag, men kanska einaferð…..

At summi skulu vera so óføroysk og tosa um lokomotiv í okkara heimliga umhvørvi, sigur alt um, hvar hesi standa fólkaræðisliga og fullveldisliga. Føroyingar hava altíð átt undangongumenn, bæði so og so og allir føroyingar hava altíð duga at givið sítt ískast til okkara fólkaræðisliga samfelag. Soleiðis hevur tað altíð verið og vónandi fer tað eisini altíð at vera so. Maður kemur í manns stað, sigur orðatakið……

Eisini eg, bæði sum vanligur samfelagsborgari, og nú eisini í polittiskum høpi, havi míni hjartamál og ynskir og eg eri eisini opin fyri at lurta eftir og fylgja við í, hvat ið til eina og hvørja tíð rørir seg í samfelagnum, fyri síðani møguliga at gerast búgvi til eitt polittiskt mál. Úr rúgvuni, av tí ið mær stendur næst, kann eg nevna:

- Fiskivinnan og fiskivinnupolitikkur
- Fiskiídnaður á landi
- Viðari virkan av fiskaúrdráttum her á landi
- Skattatrýst, lønarkrøv, realløn og kappingarføri
- Lógarbundna eftirlønartrygging fyri sjófólk
- Neyvari figgjarstýring og harvið eitt bíligari samfelag at reka eftir føroyskum leisti
- Í Føroyum skal vera gott at liva hjá øllum, yngri sum eldri
- Íløgur samsvarandi teimum figgjarligu fortreytunum
- Eitt sunt og vælvirkandi vinnulív
- Sunnar og vælvirkandi útbúgvingar
- Orka og orkumál
- Gera karmar, soleiðis at inntøkan til samfelagið Føroyar kann økjast meira enn tað, vit hava mist í blokkinum
- Gera útflutningsvinnuna meira fjølbreytta

…….ein og hvør er sær sjálvum næstur, sigur orðatakið. Gongst fólkinum, sum her livir og rørist, væl, ja, so gongur tað eisini Føroyum væl.

Tá okkara figgjarligu fortreytir eru komnar í eina meira fasta legu, og figgjarstýringin neyvari og munadyggari, tá gerst so nógv, vissuliga so nógv. Tað nyttar so lítið at tosa um fullveldið, sum tómt orð. Vit megu geva hesum eitt innihald, sum øll tjóðin kann taka undir við. Eitt fullveldið á eini flokksskrivstovu í høvuðsstaðnum er einki vert. Fullveldið ella sjálvstýrið fær veruligt virðið, tá allir føroyingar føla seg tryggar við tí. taka undir við tí og velja at standa saman um tað. Lógir, reglugerðir og eitt væl fyriskipað og væl rikið vinnulív er fortreytin. Í valprátið ber alt til - tað uppliva vit nú í hesum døgum - og tað er just hetta, sum er dilemmaði hjá fólkaræðinum: tú kanst lúgva sum tú vilt og geva mong gylt lyfti. Vónandi dugur veljarin á at skyna og sær hvat er møguligt, og hvat ikki er møguligt, men bert eru tóm orð og lyftir, og velur ella fellur sín dóm hareftir. Tað er tí vit hava valg og fólki skal fella sín dóm. Fólkaflokkurin kann fara út til veljaran við reistari pannu, tí tað er nevniliga einki annað alternativ til føroyskan politikk enn FÓLKAFLOKSPOLITIKKUR… …set tí tín X fyri Fólkaflokkin ella við eitt av valevnum hansara.

Gott nýtt ár og gott val

»Umbering«

Jónfinn Olsen
valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy

Herfyri skrivaði eg eina grein, ið eg kallaði "Frá kraft og til kraft fer tann flokkur fram". Í hesi grein siteraði eg eitt ørindi úr einum sera vøkrum sálmi/sangi. Tí eg vildi í hesum sambandi vísa á, hvussu góðan Gud vit eiga. Um vit eru fá, still og eymjúk bíða, so vil Gud gera ein útveg fyri okkum, um vit bíða eftir Honum og ikki fara at ganga fram um Hann.

Men um eg metti meg ikki gera nakað galið við at sitera hetta vers, so eri eg sera harmur um, at hetta kanska hóast alt er misskilt, og nøkur fólk eru vorðin kedd av hesum, av tí at tey halda, at eg havi siterað hetta vers til at nýta sum part av valstríðnum, og hetta kanska hevði ikki dámt skaldinum, sum yrkt hevur sangin. Um so er, vil eg við hesum biða um umbering fyri tað, tí soleiðis skuldi tað als ikki skiljast.

Hinvegin eri eg sera fegin um, at vit eiga ein so einastandandi góðan sang sum hendan, og at Gud hevur givið okkum eitt skald, sum hevur duga so gott at greitt úr hondum ein so vakran sang við so ríkum innihaldi, Gud havi tøkk fyri tað.

Eg fari tí við loyvi frá einum avarandi at sitera allan sangin niðanfyri. So allar miskiljingar hesum viðvíkjandi verða fingnar burtur.

Sangurin stendur í Songbók Guds fólks, og er nr. 1115 og er yrktur av Marius Absalonsen. Og ljóðar hann soleiðis:

1.
Eg elski tín lítla og vanvirda flokk, Á Harri títt navn veri ærað! Tú ofraði Sonin, og tað er mær nokk; Títt fátæka barn skalt tú varða.

2.
Tann maður er sælur, sum livir tær nær Títt samfelag javnan kann njóta; Í freisting og sorg fær hann styrki frá tær, Sum streymur hans signing skal flóta.

3.
Frá kraft til kraft fer tann flokkur fram, Sum stillur og eymjúkur bíðar, Til Gud ger ein útveg, sum sømir seg hann, Og fyri sítt navn tey út friar.

4.
Ja, túsund ferð heldur við Jesu forakt At liva ímillum hans kæru Enn njóta av verðini gleði og makt Og alt, hon kann veita av æru!

5.
Eg elski Guds fólk, og eg elski Guds borð, Eg elski Guds sannleik at hoyra; Eg eigi Guds lyfti, eg eigi Guds orð, Og hvat skal eg ynskja mær meira!

Ein vakur sangur, við vøkrum orðum og ríkum innihaldi.

Eg vóni við hesum at henda misskiljing er fingin av vegnum.